# VEĐRIĐ Í HÚSAVÍK



# SEPTEMBUR 2024

# VEĐURSTOVA FØROYA

**<u>Dagfesting</u>**: 16. septembur 2024

**<u>Staður</u>**: Bøgøta 6 – 230 Húsavík

**<u>Heimildarfólk:</u>** Regin Sørensen

**<u>Viðtal við</u>**: Hanus Kjølbro

## Veðrið í bygdini

Heima á Garði og sunnan fyri Á – Landið úttil Skálhøvda gongur í landnyrðing – víkin í eystan / vestan – og dalurin eisini – fjallið beint norðanfyri er Heiðafjall og Skálhøvdi – Stórafjall er sunnanfyri – Vestfelli er vestanfyri –

Í Húsvík er yvirhøvur veðurgott, og veðrið er tengt at ættini, sum tað er í øllum støðum í Føroyum.

Eingin høg og brøtt fjøll eru á Sandoynni, sum kunnu hótta við so ójavnum vindi og hørðum hvirlum, sum aðrastaðni í landinum. Formurin er rundari enn á hinum oyggjunum, og tað ávirkar eisini veðrið. Heðin Brú skrivaði á sinni, at Várharra var komin úr damugildi, tá ið hann gjørdi Sandoynna.

Bygdin Húsavík er staðsett niðast í einum dali, sum gongur eystur og vestur. Báðumegin dalin eru fjøll. Norðanfyri er eru Heiðafjall (266m) og Skálhøvdi (203m); sunnanfyri er Stórafjall (396m) og Vestfelli (397m) er vestanfyri. Tey verja bygdina fyri vindi av høg- og vesturættunum og niður í sunnan.

Á ættunum úr suðuri vesturum og upp í norðan og eysturum til landnyrðing skal lotið upp um fjøll, áðrenn tað kemur til bygdar.

Eystanfyri er opið hav, og ættirnar úr útnyrðingi og niður í sunnan koma ótarnaðar inn ímóti bygdini. Hesar eru eisini mjørkaættir. Tey sleppa ikki av við mjørkan, fyrr enn hann er farin vestur um sunnan. Ættirnar úr landnyrðingi og niður í landsynning sunnan eru brimættir.




*Mynd 1: Kort av Sandoynni. Pílarnir peika ímóti Húsavík.*

Fyri at fáa greiði á, hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Húsavík, setti undirritaði seg í samband við Regin Sørensen. Hann er føddur og uppvaksin í Húsavík og hevur altíð búð har. Hann beyð mær suður til sín at gera samrøðu um veðrið.

Við til samrøðuna, sum var í heiminum hjá honum Bøgøtu 6 Húsavík, var spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvug
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan kemur um Heiðafjall og er ein góð ætt í Húsavík.




Norðan roynist væl til vind í Húsavík, serliga heima á Garði. Vindurin er javnur, og vindferðin er nakað minni enn kring landið. Í býlinginum sunnan fyri Á rakar ættin meira á, og tí merkist og hoyrist meira til vind á norði, og hann kann tí kennast meira tráur.

Norðan er sum høgættirnar eystan fyri norðan góð terraætt í Húsavík. Í illveðri kunnu vera harðar hvirlur, men norðan er ikki skaðaætt.

Norðan er ikki ein vát ætt. Tað regnar ikki ofta, men ælaveður er viðhvørt. Norðan er kavaætt, eins og hinar høgættirnar – tað eru ættirnar útnyrðingur og landnyrðingur niður í landsynning. Á vetri kavar av norði, um kavi er í, men ættin er ikki ringasta til kava – tað eru ættirnar úr landnyrðingi niður í landsynning.

Norðan er ikki mjørkaætt.

Einki brim er á norði, uttan so at nógvur vindur er. Á vetri, tá vindur og kuldi er, kann blíva nógv brim - høgættarbrim, kalla tey tað.

## Landnyrðingur norðan

Í Húsavík gera tey ikki mun á landnyrðingi og landnyrðingi norði – tó er eingin mjørki á ættini.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur kemur undan Skalhøvda og kemur fram við landi inn á víkina.




Undantikið teim uttastu húsunum, har sum ættin fyrst rakar, roynist norðan líka væl til vind heima á Garði, sum norðan. Har er sum at vera inni, og ikki bert í góðum veðri. Er illveður, merkist tað bert eitt sindur til vindin.

Sunnan fyri Á er ættin als ikki líka góð. Hon stendur beint inná, men vindurin er javnur, og vindferðin tann sama sum fyri landið.

Landnyrðingur er ikki eitt vát ætt, bert ælingar. Ringastu ættir til regn eru útsynningur og sunnan.

Tað kann vera mjørki á landnyrðingi og ættunum eystanfyri.

Er nakað av vindi av landnyrðingi, kann skjótt vera brim í Húsavík.

## Landnyrðingur eystan

Tá ið ættin er landnyrðingur eystan líkist veðrið nógv veðrinum, tá ið hann er eystan. Hann kemur undan Skálhøvda. Tað er meiri brim í syðru helvt av mølini, enn tað er longri heimi.

## Eystan

Er ættin eystan, liggur hann av havinum og beint inn eftir víkini.




Vindurin er javnur, tá ið hann liggur av eystri, og vindferðin er nakað tað sama sum fyri landið. Eingin munur er í veðrinum Heima á Garði og Sunnan fyri Á.

Veðrið er ráligt, men tað regnar ikki so illa á ættini. Men viðhvørt, sjálvandi.

Rá luft kemur uttan úr havinum, og ofta er mjørki á ættini. Men ikki altíð. Tað ber til at turka hoyggj á eystri, men tað fæst ikki skart hoyggj úr linum terra.

Eystan liggur beint inneftir, og hon er ring brimætt.

29. februar 2020 var illveður av eystri, og brimið var av tí allarmesta í Húsavík. Ein lagaður garður oman ímóti mølini fór í briminum og allur bakkin framundir. Vegurin beint vestan fyri mølina skrædnaði eisini, so har var ikki koyrandi. Tilfarið í fjøruni kom langt niðan á bøin.

## Landsynningur eystan

Landsynningur eystan liggur ráur og tráur beint inná og líkist ógvuliga nógv bæði eystri og landsynningi.

## Landsynningur

Landsynningur kemur tráur til bygdina, eins og landsyningur eystan.




Tá ið tað kemur til vind, líkist landsynningur nógv eysturættini í Húsavík. Lotið kemur inn eftir víkini.

Sum á eysturættini, er veðrið ráligt á landsynningi, og tað regnar ikki so illa á ættini.

Vindurin er javnur á ættini, og vindferðin tann sama sum sagt er fyri landið.

Landsynningur er mjørkaætt og ring brimætt.

## Landsynningur sunnan

Á landsynningi suðuri veðrið er eitt bland av landsynningi og suðuri. Hann kemur undan Tanganum, og lendingin liggur afturundir. Er eystanbrim, verður kyrt, tá ið hann fer niður í landsynning sunnan.

## Sunnan

Sunnan liggur framvið og fer norður við landinum ímóti Skálhøvda.




Tá ið hann er sunnan, er vindurin javnur. Meira vindur er Heima á Garði enn Sunnan fyri Á. Júst tað øvugta, sum av norði og landnyrðingi. Sunnan er besta ætt Sunnan fyri Á. Har er stilli, uttanso at tað er nógvur vindur.

Suðurættin kann vera vát viðhvørt við nógvum regni, men kann eisini vera turr og hava liggjandi góðveður við sær.

Mjørki kann vera á suðurætt. Í Húsavík sleppa tey ikki av við mjørkan, fyrr enn hann er farin vestur um sunnan.

Sunnan er vanliga ikki brimætt í Húsavík, men er nógvur vindur, kann vera eitt sindur av brimi. Fram við landinum ímóti Skálhøvda brimar á suðurættini.

## Útsynningur sunnan

Tá ið ættin er útsynningur sunnan, líkist veðrið veðrinum á suðuri.

## Útsynningur

Útsynningur er ein góð ætt í Húsavík




Vindurin er javnur, tá ið ættin er útsynningur, og vindferðin er minni enn tað, sum verður sagt. Gott víkaveður – t.e. gott av fara á víkina við báti.

Er nógvur vindur, er veðrið óróligt við kastivindum Sunnan fyri Á; vindurin kann mala vatnið úr hyljum og upp í loft. Heima á Garði er ikki so nógv av tí.

Útsynningur er ein vát ætt, tað kann regna nógv.

Útsynningur er mjørkaætt, men ikki brimætt í Húsavík.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er eisini ein góð ætt í Húsavík. Hon líkist bæði útsynningi og vesti, sum báðar eru góðar ættir.

## Vestan

Vestan liggur út eftir víkini og er ein góð ætt við javnum vindi.




Lítil munur er á vesturættini og útsynningi. Ein munur er, at vindferðin er sum fyri landið.

Regnið er eisini sum á útsynningi, nógvir regndagar eru á ættini.

Útsynningur er hvørki mjørka- ella brimætt í Húsavík.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið á útnyrðingi vestri líkist veðrinum, tá ið ættin er útnyrðingur.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur kemur heim ígjøgnum dalin.




Útnyrðingur liggur tráur heim ígjøgnum bygdina. Hann er javnur og gjøgnumtreingjandi, og vindferðin er tann sama sum fyri landið. Er nógvur vindur, kann hann fara at mala og tøma hyljar.

Ættin er ikki vát. Sjálvdan nógv regn, men heldur ælaveður.

Útnyrðingur er ikki mjørkaætt í Húsavík.

Útnyrðingur ger stóra vindvág úteftir víkini, og tað kann vera sera óslætt útfyri, hóast slætt bæði norðan- og sunnanfyri.

Høgættabrim er á útnyrðingi. Í góðveðri er vanliga ikki brim.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum, tá ið ættin er norðan.